Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 30 - 12. februar 2010

## Prestur hótti við eldi

Ein prestur í Hedmark í Noregi hevur viðgingið, at hann hótti við at seta eld á húsini hjá grannanum. Blaðið Glåmdalen skrivar, at undir avhoyringum hjá løgregluni viðgekk presturin, at hann hevði sent grannanum eitt brævv við einari ávaring um, at hús hansara fóru upp í royk um stutta tíð. Við brævinum var ein mynd av einum húsum í ljósum loga. Einki navn stóð undir brævinum, men ymisk spor leiddu løgregluna til prestin. Hann hevur nú viðgingið seg sekan og hevur søkt um at verða loystur úr embætinum, skivar Glåmdalen. Blaðið nevnir ikki, hví presturin hótti grannan við eldi.



## Skulu drekka minni

Tá fólk koma saman til eitt ella annað í Russlandi, er tað at kalla vanligt, at ein ella fleiri fløskur av vodka koma á borðið. Men soleiðis eigur tað ikki at vera, og í øllum førum skulu russar drekka minni. Tað siga myndugleikarnir, og ein av oddamonnunum fyri átakinum er forsætisráðharrin, Vladimir Putin. Hann hevur sett sær fyri, at russar skulu drekka helvtina minni enn nú. Tað skal millum annað gerast við at gera brennivínið dýrari og við at banna øllum drykkjum við alkoholi í sambandi við ítróttartiltøk, skrivar NTB.

# Minst nøgdsemi við

**Foreldrini at børnum á dagstovninum við Landavegin vóru ringast nøgd við stovnin, tá Tórshavnar kommuna gjørdi umfatandi kanning av dagstovnaøkinum í maimánaði 2009. Fyrst vildi kommunan bert upplýsa tríggjar teir bestu stovnarnar, men nú hevur Sosialurin fingið innlit í nøgdsemið við allar stovnarnar**

KANNING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Størst nøgdsemi er við býlingshúsið á Ternuryggi. Ringast nøgdsemi er við dagstovnin við Landavegin. Nøkulunda sama nøgdsemi er við nógvar stovnar, men umframt dagstovnin við Landavegin er nøgdsemi lægri við fimm aðrar stovnar.

Soleiðis er støðan við dagstovnunum í Havn sambært kanning, sum greiningarfyritøkan Lóður hevur gjørt fyri Tórshavnar kommunu, og Sosialurin hevur fingið innlit í.

Hóast Sosialurin ikki hevur fingið innlit í orsøkirnar til minna nøgdsemið á teimum fimm stovnunum, so vísir heildarúrslitið, at foreldur helst vilja seta síni børn á stovnar har nógvir pedagogar eru, umframt, at foreldur helst ikki vilja hava ov nógv ungfólk til arbeiðis.

Men tað er eisini soleiðis, at í teimum støðunum, har foreldrini eru yngri og betri útbúgvin, har krevja tey meira av stovninum.

Haraftur kann annað órógv eisini ávirka stovnin.

### Trek kommuna

Upprunaliga var ætlanin ikki, at talan skuldi vera um nakra kapping millum dagstovnarnar, men tá kanningin varð lagt fram á tíðindafundi 25. januar, varð greitt frá, hvørjir tríggir teir best umtóktu stovnarnir eru.

Sosialurin vildi beinanvegin hava innlit í restina av nøvnunum á listanum, men hetta vildi Tórshavnar kommuna ikki upplýsa við teirri grundgeving at tilfarið ikki var tókt.

Hinvegin segði trivnaðarstjórin hjá kommununi, Jóan Petur Hentze, at tað, at tríggir teir fremstu stovnarnir vóru navngivnir, í ringasta føri kundi hava við sær, at foreldur fóru at velja teir stovnarnar fram um hinar, umframt, at hann svaraði við tøgn, tá hann varð spurdur, um hetta legði allar hinar stovnarnar undir illgruna fyri at vera ringastir.

Somuleiðis segði Katrin Petersen, deildaleiðara á barna og ungdómsdeildini hjá Tórshavnar kommunu, at tað ikki vóru upplýsingar, sum kommunan hevði biðið um, tá hon varð spurd hví tað ikki ber til at fáa upplýsingarnir, sum innlit varð biðið um.

Tá Sosialurin aftur bað um innlit í alt samskifti, sum hevur verið millum Lóður, sum gjørdi kanningina, og stovnar undir Tórshavnar kommunu, bragdaði endiliga og listin sum her er prentaður varð útflýggjaður.




*Í maimánaði 2009 varð nøgdsemið við ymisku dagstovnarnar í Tórshavna kommunu, sum hendan talvan vísir. -100 er tað minsta, 0 er miðal og 100 er tað mesta*
*Kelda: Lóður*

# Garðurin oyðileggur nógv

**Kirstin Djurhuus, leiðari á stovninum við Landavegin, sum hevur fingið ringast skoðsmál millum foreldrini, er vís í, at tað eru garðurin, sum ikki var liðugur, tá stovnurin varð gjørdur, og fáu pedagogarnir á stovninum, sum hava lagt hennara stovn so lágt. – Nógv er broytt, sigur hon tó**

KANNING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast nøkur børn eru flutt á aðrar stovnar, síðan kanningin varð gjørd í maimánaði í fjør, so kemur lítla nøgdsemið óvart á Kirstin Djurhuus, leiðara fyri dagstovnin við Landavegin.



*Í gjár sá soleiðis úr í garðinum hjá dagstovninum við Landavegin. Leiðarin metir garðin vera eina av orsøkunum til úrslitið, sum vísir, at fólk eru minni enn miðal væl nøgd við stovnin*

– Ja, tað kom óvart á, at tað skuldi vera so galið. Nøkur børn eru hildu uppat í fjør, og nógv eru farin í skúla, so eg ivist í, um tað eru tey, sum hava svarað, tí nú hoyra vit ikki nakað um ónøgd, sigur Kirstin Djurhuus.

Hon leggur afturat, at ein av orsøkunum er, at garðurin ikki var gjørdur liðugur, tá stovnurin lat upp.

Umframt, at fáir pedagogar vóru á stovninum, tá kanningin varð gjørd, hóast hon metir, at starvsfólkini avgjørt gera sítt arbeiðið til lítar.

Av umleið 15 starvsfólkum vóru tríggir pedagogar, tá kanningin varð gjørd, og í garðinum var rættiliga tómligt, umframt eitt stórt runudíki, sum tó er hegnað inni.

### Ikki tikin í álvara

Leiðarin á dagstovninum við Landavegin vísir eisini á, at kanningin kanska ikki varð tikin í nóg stórum álvara, tá hon var gjørd.

– Tað eru so fá, sum hava svarað, so kanningin er kanska ikki tikin í nóg stórum álvara, og vit lýstu heldur ikki við kanningini, sigur leiðarin.

Tað vóru beint yvir 35 prosent av foreldrunum, sum svaraðu í nøgdsemiskanningini.

### Nógv er broytt

Síðan kanningin varð gjørd í maimánaði 2009, er tó rættiliga nógv broytt á stovninum, og nú sigur leiðarin seg ikki hoyra nakað til veruliga ónøgd, tvørtur ímóti.

– Vit vóru til dømis tríggir pedagogar, tá kanningin varð gjørd og nú eru vit fimm, so tað er ein pedagogur á hvørjari stovu, og vit hoyra onki um ónøgd í dag, greiðir leiðarin frá.